# Niðurstøðan talar fyri seg

**Jørgin Niclasen landsstýrismaður provokerar, tá hann ikki vil góðkenna frágreiðingina hjá kanningarstjóranum, sum sigur, at alt ikki er rætt farið fram í hansara umsiting. Tað heldur Heini O. Heinesen, formaður í landsstýrismálanevndini. Niðurstøðan hjá kanningarstjóranum er greið, sigur hann**

EMBÆTISFØRSLA
*Ingi Rasmussen*

Skeiv málsviðgerð og vantandi metingar í Fiskimálaráðnum hava ført til millíónatap hjá landskassanum, tá lán til tveir rækjutrolarar vórðu løgd um.

Tað kann lesast í frágreiðingini hjá kanningarstjóranum Turið Debes Hentze, advokati, sum eftir áheitan frá løgtinginum hevur kannað embætisførsluna hjá Fiskimálaráðnum í sambandi við umløgd lán til fjarfiskiflotan.

Kanningastjórin staðfestir samstundis, at tað er Jørgin Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, sum hevur ábygdina av, at málsviðgerðin ikki varð nøktandi og førdi til tap hjá landskassanum.

– Niðurstøðan talar fyri seg, sigur Heini O. Heinesen, formaður í landsstýrismálanevndini, sum bað um kanningina í síðsta løgtingskeiði.

*Tað er rættiliga provokerandi, um landsstýrismaðurin ella løgmaður ikki vilja góðkenna niðurstøðuna hjá kanningastjóranum, sigur Heini O. Heinesen*



## Ósømiligt

Sjálvur hevur Jørgin Niclasen landsstýrismaður alment sátt iva um løgfrøðiligar niðurstøður sum hesar.

Tað hóvar als ikki formanninum í landsstýrismálanevndini.

– Tað sømir seg ikki, at landsstýrismaðurin mótmælir, at skeivt er farið fram, tá tað er niðurstøðan hjá einum kanningarstjóra, og tað er eisini skeivt, um løgmaður letur standa til. Um ongin viðgongur feilin í Fiskimálastýrinum, so sær tað ikki gott út, sigur Heini O. Heinesen.

Hann vil kortini ikki siga, hvat landsstýrismálanevndin ger við málið, nú kanningarstjórin hevur gjørt sínar niðurstøður. Nevndin skal hava eftirlit við, at landsstýrið umsitur rætt sambært stýrisskipanarlógini, men Heini O. Heinesen heldur tað vera skeivt av sær at fella nakran dóm í málinum.

## Provokerandi

– Okkara uppgáva er ikki at vera dømandi. Vit leggja málið opið fram, og so er tað uppgávan hjá løgmanni, landsstýri ella løgtingi at gera av, hvørjar avleiðingar málið fær. Men tað er greitt, at tað er rættiliga provokerandi móti einum og hvørjum mótparti, um landsstýrismaðurin ella løgmaður ikki vilja góðkenna niðurstøðuna hjá einum kanningastjóra, sigur Heini O. Heinesen.

Í løtuni sita umsitingarnar í Løgmansskrivstovuni og Fiskimálaráðnum og tulka frágreiðingina hjá kanningarstjóranum og gera sínar egnu niðurstøður. Vil løgmaður ikki skera ígjøgnum, og noktar landsstýrismaðurin at leggja frá sær, so stendur tað til løgtingið at gera av, um misálit skal reisast móti landsstýrismanninum. Eitt slíkt uppskot um misálit skulu vit ikki vænta kemur frá Heina O. Heinesen ella landsstýrismálanevndini.

Landsstýrismálanevndin fer at viðgera málið um embætisførsluna hjá Jørgin Niclasen eftir nýggjár, tá hon aftur hevur fund. Nú skal løgfrøðingurin hjá nevndini leggja málið fyri nevndarlimirnar. Í nevndini sita umframt Heina O. Heinesen úr Tjóðveldisflokkinum, Kaj Leo Johannesen úr Sambandsflokkinum og Jákup Mikkelsen úr Fólkaflokkinum.

# Maria Tróndarson farin



Sunnudagin bórust boðini um, at Maria Tróndarson í Havn var deyð, einans 38 ára gomul. Maria var úr Havn, dóttir Trónd Tróndarson úr Skálavík og Doris f. Blåsvær av Argjum.

Maria var lærari, hon tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1988, og árið eftir fór hon í starv sum lærari á Venjingarskúlanum, har hon hevur verið síðani.

Fyri nøkrum árum síðani gjørdist Maria sjúk. Hóast hon var komin fyri seg aftur, so tók sjúkan seg uppaftur – og so meint, at hon doyði í heiminum síðsta sunnumorgun.

Maria átti trý børn, Rannvá, Trónd og Tórald, sum eru ávikavist 16, 14 og 8 ára gomul.

Eyðkent var blíða smílið og lætta lyndið hjá Mariu. Hon var nógv avhildin, bæði sum lærari, starvsfelagi og sum menniskja. Tað vísti eisini tann stóri skari, sum í og rundan um Vesturkirkjuna fylgdi henni til jarðar annan jóladag.


## Tøkk

*Hjartaliga takki eg øllum,*
*ið gleddu meg á 80 ára degnum 14.10.*

*Blíðar heilsanir og gleðilig jól.*

**Oddvør Hermansen**
**Tvøroyri**


# Til minnis um Torkil Dalbúð



So veikur og so skerdur
í førleika hann var
og sera lítið verdur,
sum mannaeyga sær.
Ei beinini hann bóru
til barnaspæl og leik,
tey undan honum fóru,
og hondin var so veik.

Bert fýra ár á foldum
- ja, bert eitt lítið bil -
so hvíla undir moldum.
Hvat skuldi hetta til?
Man Gud mær kunna svara,
hvør meining var við tí.
Var lítli Torkil bara
til kvøl og sorg og stríð?

Tá slíkar kenslur troka
seg í mítt hjarta inn,
tað kennist sum ein toka,
sum myrkir sál og sinn;
tá vónloysi er bara
- um trúgvin ikki var -
hvør kundi tá mær svara
mítt hví, mítt hvat og hvar?

Men Gud mær hevur svarað:
"Hoyr, lítli Torkil var
eitt lán til tykkum bara,
nú hvílir hann hjá Mær.
Tann kærleiki, tit góvu,
av einglum borin varð,
og bønirnar, tit bóðu,
eg goymi her hjá Mær.

Tað var Mær angi søtur,
tann kærleiki, hann fekk,
um trongar tyktust gøtur,
og móti streymi gekk.
Eitt ævinleikans virði
í dýrum skálum goymt,
Eg takki tykkum fyri,
Eg havi einki gloymt."

Til fulnar ei vit skilja,
Gud hægri er enn so,
hvørt grasstrá og hvør lilja,
tey bera okkum boð
um vísdóm Hans, sum hevur
í orði sínum sagt,
at Hann ei blundar, svevur,
men altíð er á vakt.

Langt áður enn vit lógu
í móðurlívi smá,
Guds eygu okkum sóu,
Hann kendi okkum tá.
Hvørt kykt er í Hans hondum,
er Honum undirlagt,
í øllum heimsins londum
Hann hevur alla makt.

Tað veika ílat, skarðað,
Gud tók í sína hond,
hin dýra skattin kæra
bar heim á himnastrond.
Har dýrdarlikam bera,
so fullkomið og gott,
har einki ónt skal vera,
bert dagur - eingin nátt.

**Harry**



# Nú er at hyggja frameftir

**Tá landsstýrismaðurin við heilsumálum, Bill Justinussen, fyrr í mánaðinum var á vitjan á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, slapp hann at hyggja gjøgnum lúkuna inn á skurðstovuna, har tey júst vóru í ferð við at skera fyri æðraknútar**



*Ert tú landsstýrismaður, mást tú tola eitt sindur av hvørjum. Bill Justinussen, landsstýrismaður við heilsumálum, sá eitt sindur heitt tikin út, tá hann slapp at hyggja inn á skurðstovuna, meðan skorið varð*

*Mynd Rúna Sivertsen*

MANGT OG HVAT
*Rúna Sivertsen*

Tað er mangt og hvat, ein landsstýrismaður má leggja oyru og eygu til. Um landsstýrismaðurin við heilsumálum, Bill Justinussen, hevur nakað skil fyri æðraknútum, sigur søgan einki um. Men tá hann tann 5. desember var á vitjan á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, slapp hann at hyggja inn gjøgnum lúkuna á skurðstovuni, har tey júst vóru í ferð við eina slíka skurðviðgerð.

Á myndini sær landsstýrismaðurin nakað forfardur út, men tað er heldur ikki hvønn dag, tú ert áskoðari til eina skurðviðgerð.

Nú fíggjarlógin varð samtykt beint fyri jól, mátti Bill lata sær lynda, at játtanin til heilsuverkið gjørdist 12 milj. kr. minni, enn landsstýrismaðurin hevði biðið um.

Hjá landsstýrismanninum er bara eitt at gera; at líta frameftir og halda eitt vakið eyga við, at játtaninar fyri komandi fíggjarár koma at halda.

# Nýggjárshald í Runavíkar Kommunu



NÝGGJÁRSHALD

Nýggjársnevndin í Runavíkar Kommunu skipar aftur í ár fyri felags nýggjárshaldi fyri íbúgvunum í kommununi.

Byrjað verður kl. 23.30 við kyndlagongu frá Rókini og inn á nýggja havnarøkið. Nýggjársrøðan verður hildin á miðnátt og stóra bálið verður tendrað. Harumframt verður skipað fyri felagssangi, og fólk fáa høvi til at skjóta egið fýrverk.

Nevndin heitir á fólk um at brúka trygdarbrillur og stativini, ið verða sett upp til endamálið.

Orkestrið Brak, sum er samansett av lokalum tónleikarum, spælir til nýggjársdans í Ítróttarhøllini í Runavík kl. 01.00.

Ætlanin er at gera eitt sindur burturúr fyri at fáa høllina so hugnaliga sum gjørligt.





Neyðrakettin er effektiv og fer gjøgnum nærum alt - eisini heimið, sum er karmurin um hugna og tryggleika, ikki minst á jólum og nýggjárinum.
Neyðrakettin kann vera seinasta álitið hjá sjómanninum, tá vandi er á ferð og hjálp er lívsneyðug.
Tað er bert loyvt at nýta neyðrakett um veruligur vandi er á ferð.
Set rætta dámin á nýggjarárshaldið uttan nýtslu av neyðrakettum.

*Politiið og tryggingarfeløgnini*

TRYGD Politiið TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR